# Trupulleiki um alt landið

**BÚSTAÐARSKYLDA Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, heldur, at trupulleikin við tómum húsum er so mikið stórur kring alt landið, at tíðin er komin til í álvara at umhugsa bústaðarskyldu**



**LÓGARBROYTING**

*Heðin Mortensen roknar við, at Tórshavnar býráð fer at hita á landsstýrið um at broyta lógina soleiðis, at bústaðarskylda í ávísum førum kan setast í verk*

Leo Poulsen

Tað var ein borgarafundur í farnu viku í Nólsoy, sum setti hol á spurningin hvat gerast skal við øll tey húsini, sum standa tóm kring landið, og sum eru ein stórur partur av trupulleikanum við búseting á bygd.

Í hesum førinum helt Heðin Mortensen, at tað hevði verið rímiligt, at húsaeigarar at húsum á bygd, ið ikki verða nýtt, leigaðu síni hús út soleiðis, at møguleiki er hjá serliga ungum fólki at seta búgv uttan fyri miðstaðarøkini, um ynski er til tað.

Borgarstjórin heldur, at alternativið er greitt.

Ber hetta ikki til, so mugu vit bara bera so í bandi, at bústaðarskylda verður ásett fyri viðkomandi øki. Og hetta eigur at verða galdandi fyri alt landið, serliga tá hugsað verður um bygdamenning, segði Heðin Mortensen við Rás2 í gjár.

Hann heldur, at vit eiga at sipa so fyri, at lív kemur aftur í tómu húsini.

Alternativið er, at bygdirnar minka, og húsini standa eftir sum spøkilsishús, og tað skapar onga framtíð.

Heðin Mortensen ásanar, at tað verður trupult at gera nakað við hendan ítøkiliga trupulleikan.

Vit hava tosað um hesi viðurskiftini, bæði í Kommunusamskipan Føroya og í býráðnum, men hetta er ognarviðurskifti, ið pilkast skal við, og tað er ikki bara sum at siga tað. Tá skulu helst løgtingslógi roytast, sigur Heðin Mortensen.

Hann ásannar víðari, at Nólsoy á ongan hátt er í nakrari serstøðu.

Vit kenna til somu støðu her í høvuðsstaðnum, og tað standa fleiri hús tóm í gomlu Havnini, sum mest at kalla bert verða nýtt til summarhús, og tað ætla vit okkum at gera nakað við. Tað er jú eisini talan um tænastur og annað líknandi, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur tað tí verða sannlíkt, at Tórshavnar býráð tá tíðin er komin fer at heita á landsstýrið um at broyta lógirnar soleiðis, at talan kann gerast um bústaðarskyldu í ávísum økjum ella í ávísum førum.

Tað bar ikki til áðrenn evstamark at fáa eina viðmerking frá Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, sum umsitur kommunu- og lógarmál.

leo@sosialurin.fo



**TRUPULT**

*Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag, ásannar, at tómu húsini á bygd er við til at draga ungfólkið til miðøkini*

# Tóm hús ein trupulleiki

**BÚSTAÐARSKYLDA Tað er einki eindømi fyri Nólsoy, at hús standa tóm úti á bygd. Formaðurin í Føroya Kommunufelag váttar, at støðan er hin sama í fleiri av limakommununum í FKF**

Leo Poulsen

Við Rás2 í gjár segði Heðin Mortensen, at tóm hús eru ein stórur trupulleiki í Nólsoy, tí húsaeigararnir vilja hvørki selja ella leiga húsini út. Og tá peningastovnarnir samstundis eru serstakliga trekir at veita lán til nýbygging á bygd, hava tey ungu ofta einki annað í at velja, en at flyta av bygdini.

Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag, váttar, at sami trupulleiki ger seg galdandi í fleiri av limakommununum.

Og trupulleikin er serliga stórur á útoyggj, staðfestir Asbjørn Djurhuus.

Summar bygdir hava eisini tann trupulleikan aftrat, at smátt er við lendi, og tá ger trupulleikin við, at fólk hvørki vilja selja ella leiga síni hús út, tí tá eru hesi hús einasti møguleiki, sum er.

Rákið hevur tey mongu seinastu árini verið, at fólk søkja úr útjaðaranum inn í miðøkini, og tað er kanska ein náttúrlig menning. Men fáa tey fáu, ið ynskja at verða verandi í útaðaranum ikki høvi at seta búgv, tá eru ikki stórar vónir fyri smáu bygdunum, sigur Asbjørn Djurhuus.

Tað er væl heldur ikki lætt at gera nakað við trupulleikan, tí tað liggur náttúrliga í fólki, at tey hava ein serligan tokka til sítt barnaheim, og tey, sum flyta av bygd inn í miðstaðarøkini, fegin vilja varðveita sítt barnaheim at koma aftur til. So talan er í veruleikanum um eitt tvíeggjað svør.

**Bústaðarskylda**

»Ejendomsretten er ukrænkelig«, verður ofta tikið til, og tí verður ógvuliga trupult at áseta bústaðarskyldu. Spurningurin er bara, um myndugleikarnir ynskja at varðveita ein bygdan útjaðara, tí ynskja teir tað, so er eyðsæð, at okkurt má gerast.

Tú trívur inn í ognarrættin, um bústaðarskylda verður ásett, og tað er ivasamt, hvat eg skal halda um tað. Men húsini eru jú ikki eindømi, tí sama skilið er við jørðini, sigur Asbjørn Djurhuus.

Alt hongur jú neyvt saman við politisku ætlanini um bygdamenning, og ein slík ætlan verður trupultgjørd, um tað ikki ber til hjá serliga ungfólki at seta búgv úti á bygd.

Bygdamenning umfatar vælsaktans eisini vanligt samband við útjaðaran, og har hevur ikki staðið líka væl til allastaðni. Serliga Fugloyggin og Svínoyggin er framvegis illa fyri í so máta, sigur Asbjørn Djurhuus.

Hann heldur eisini, at politikararnir hava selt havnarlagið í Skúvoy fyri ítróttahøllina á Sandoynni.

Eg havi sjálvandi einki ímóti, at sandoyingar nú fáa eina ítróttahøll, men tað sær út til at hava kostað skúvoyingum tær 18 milliónirnar, teimum vórðu lovaðar, til at gera eitt nýtiligt havnarlag, sigur Asbjørn Djurhuus.

Ognarrætturin heilagður.

Asbjørn Djurhuus, formaður í Føroya Kommunufelag, ivast í, um tað letur seg gera við bústaðarskyldu, tí tað ger seg inn á ognarrættin

leo@sosialurin.fo